# Gullið smakkaði betri hesa ferð



*Todi Jónsson staðfesti sína støðu í FCK sunnudagin. Hann skoraði sítt 11. mál hetta kappingarárið og er sostatt enn einaferð toppskjútti hjá felagnum. Eisini hóast hann hevur fingið væl minni av spælitíð enn vant í ár*

*Mynd: Scanpix/Nordfoto*

**Fyri Toda Jónsson, sum eftir ellivu ára steðg aftur skal royna seg ímóti Skonto Riga í Europa Cup, hevur tað stóran týdning, at hann hesa ferð var við til at spæla gullið í DM skápið hjá FCK**

ÚTISETI MEISTARI
*Jóannes Hansen*

Todi Jónsson var í brennideplinum, tá ið FCK sunnudagin so sera sannførandi vann danska fótbótsmeistaraskapin fyri triðju ferð. Fyrsta ferðin var í 1993. Tá var Todi eitt fullkomuliga óskrivað blað í donskum fótbólti. Onnur ferðin var í 2001. Tá var Todi partur av FCK liðnum, men sum so mangan áður so var hann skaddur, tá ið avgerandi dystirnir vórðu spældir.

Sunnudagin vann FCK DM, og Todi eigur sín stóra part av fyrsta plássinum. Hann var á liðnum fyrstu fimm korterini, og hann var sera væl upplagdur og ágangandi. Tríggjar minuttir undan steðginum drønstútaði hann hornasparksinnlegg úr høgru upp í málhornið. FCK kom harvið framum 2–0, og júst hetta málið tóktist gera av við allar AGF vónirnar um at fáa nakað burturúr vitjanini í Parkini.

– Tað hevði stóran týdning fyri okkara avrik, og tað hevði alstóran týdning fyri mítt avrik, at eg aftur fekk høvi at gera mál. Ikki minst eftir at tað næstseinasta vikuskifti ikki gekst so væl við málskjótingini í Esbjerg, sigur Todi Jónsson.

Kendist tað øðrvísi at vinna DM hesa ferð, enn tað gjørdi fyri tveimum árum síðani?

– Ta ferðina hugdi eg at, meðan liðfelagarnir vunnu DM. Nú var eg millum teir fyrstu ellivu, og tað er sjálvandi heilt øðrvísi. Hýrurin á teimum 37.582 áskoðarunum var framúr. Vit savnaðu okkum fult og heilt um okkara uppgávu. Aftaná skiltu vit, at Silkeborg syrgdi fyri, at Brøndby ongan møguleika hevði. Tað mundi vera við til at lyfta lagið í Parkini so langt upp beinanvegin, sigur Todi Jónsson.

### Aftur ímóti Skonto Riga

Sunnudagin stóð Todi Jónsson fyri triðju ferð við gullkrónunum um hálsin. Onnur ferðin var fyri tveimum árum síðani, og fyrsta ferðin var í 1991. Tá vóru Todi og liðfelagarnir eisini ógvuliga fegnir. Liðfelagarnir ta ferðina vóru teir í barndómsfelagnum í Klaksvík, sum í 1991 vann fyrsta meistaraskapin í nítjan ár.

Umstøðurnar ta ferðina vóru væl øðrvísi hjá 19 ára gamla Toda og øllum hinum, enn tær vóru í Parkini sunnudagin. FM heitið kom til høldar ein ódnar sunnudag í Gøtu. Veðrið var so ivasamt, at tað var ikki víst, at KÍ og viðhaldsfólkini skuldu sleppa aftur til Klaksvíkar, men tað eydnaðist.

Árið eftir, í 1992, var KÍ sum fyrsta føroyska felagið nakrantíð við í Europa Cup fyri meistaralið. Mótstøðuliðið í fyrsta umfarinum var Skonto Riga úr Letlandi. Tað var fjáltur á óroyndu føroysku spælarunum, sum taptu báðar dystirnar. Á Svangaskarði var úrslitið 3–1 til gestirnar. Todi Jónsson minnist tann dystin millum annað fyri rimmar langskotið, sum hann úr vinstru sendi upp undir handaru samankomingina.

Um fjúrtan dagar fer FCK undir fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið. Størsta avbjóðingin verður at sleppa upp í part í europeisku meistarakappingini. Fyrsta forðingin, sum skal fáast av vegnum, um FCK skal sleppa upp í part í bólkaspælinum, er júst Skonto Riga.

Í Europa Cup lutakastinum fríggjadagin varð greitt, at í fyrsta innleiðandi umfarinum skal Skonto Riga spæla ímóti maltesiska meistaraliðnum. Eingin ivi er um, at letlendska meistaraliðið er greiður favorittur í tí uppgerðini.

Um møguleikarnar í Europa Cup ímóti Skonto Riga sigur Hans Backe, FCK venjarin, soleiðis:

– Teir hava eitt gott lið. Men skulu vit hugsa um bólkaspælið, so mugu vit vinna á sovornum liðum. Í triðja og síðsta innleiðandi umfarinum fara vit at spæla ímóti onkrum størri europeiskum felagið. Tað verður stóra royndin. Men skulu vit fáa høvið at royna okkum har, so mugu vit vinna á FC Skonto Riga.

Fyri tveimum árum síðani var mótstøðuliðið hjá FCK í triðja innleiðandi umfarinum Lazio úr Italia. Todi Jónsson var skaddur, og tað eydnaðist ikki FCK at spæla seg í bólkaumfarið.

– Nú hvíla vit eitt sindur og fegnast um meistaraskapin. Men um fjúrtan dagar verður tað aftur álvari. Tá fara vit undir fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið. Fyrsta umfarið í landskappingini verður tveir dagar fyri ólavsøku, sigur Todi Jónsson, sum kemur ein lítlan svipp til Føroya, nú tað er steðgur í donsku fótbóltskappingini.

Allir føroyingar ynskja Toda Jónsson tillukku við danska meistaraskapinum. Hann eigur sín stóra lut í DM. Málið hjá honum sunnudagin var tað 11. í hesum kappingarárinum. Harvið er hann toppskjútti hjá FCK, og hann telist millum aðrar sum sætti besti málskjútti í superliguni í hesum kappingarárinum. Um úrtøkan verður roknað fyri hvønn minutt á vøllinum, er tað neyvan nakar annar, sum hevur verið so óførur at gera mál, sum Todi Jónsson hevur verið tað.



VB-HB 2-3 (1-2):

# Andrew fekk stigini til HB

**Toppskjútin frá í fjør skeyt hat-trick, tá loksins vann landskappngardyst á Eiðinum, men havnarmenninir mundur eisini prísa sær lukkuliga fyri Bárð Johannesen, sum aftur stóð ein branddyst**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Møark*



*Hóast VB fyri tað nógva var spælstýrandi, so vóru tað gestirnir úr Havn, sum fyri fyrstu ferð í 13 ár fóru úr Vági við øllum*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

HB hevði ikki vunnið í Vági síðani 1991. Somikið døpur vóru hagtølini hjá føroyameistarunum tá teir leygarkvøldið løgdu leiðina til Vágs. Eisini hóast HB nú hevði Rúna Nolsøe við eftir skaða, og hóast VB enn ikki hevði vunnið landskappingardyst í ár. Tí tað hevur onkun tíð áður verið støðan, uttan at hetta tó hevur hjálpt HB har suðuri.

### VB-trýst og HB-mál

Men alt var øðrvísi hesaferð. Kanska var tað ikki so øgiliga nógv spælið, sum var øðrvísi. Bæði liðini royndu í hvør sínum lagi at trýsta, men tað var ikki tað heilt stóra, sum varð skapt av møguleikum fyrstu løtuna. Kanska var tað VB, sum hevði yvirvágina, men kortini vóru tað gestirnir, sum løgdu seg framum, tá knappir 10 minuttir vóru leiktir. Rógvi Jacobsen longdi innkast úr høgru, og tó at Andrew stóð við rygginum til málið, so fekk hann bæði tíð og pláss at snara sær á, áðrenn bólturin varð høgdur upp í málið, og so var frøði á gestunum.

Frøðin gjørdist ikki minni, tá sami Andrew av Fløtum um miðjan hálvleikin økti til 2-0. Hesa ferð kom uppleggið úr vinstru, har Tór-Ingar Akselsen slapp sær avstað. Hann sendi eitt hart og gott innlegg móti málinum, og har var Andrew av Fløtum aftur á staðnum, og við einum góðum stútara kundi hann økja um leiðsluna.

Millum hesi bæði málini hevði Bárður Johannesen nýtt høvið at sýna, at hann veruliga er um at finna stórformin. Seinasta vikuskifti var hann av álvara við til at punktera EB/Streym, tá hann tók sær av einum brotssparki, og hetta kynstrið endurtók hann sunnudagin. Hesa ferð var skjúttin Birgir Jørgensen, men tað órógvaði ikki HB-málverjan, sum í stórum stíli fekk beint tann vandan av vegnum, og sama skili var løtu seinni, tá vágbingar royndu seg við góðum langskoti.

### Stríðið gav bonus

VB hevði tó við hesum sent HB nakrar ávaringar, og fyri mong mundi tað bara tykjast sum ein spurningur um tíð, áðrenn vágbingar javnaðu leiðsluna hjá gestunum, og 10 minuttir fyri hálvleik fingu teir løn fyri stríðið. Birgir Jørgensen varð sendur avstað í høgra álopsborði. Bólturin varð sendir inn í HB brotsteigin. Úr vinstru kom Palli Augustinussen stormandi, og við einum góðum skoti sendi hann bóltin inn við nærmasta stólpa.

Málið gav av álvara VB trúnna uppá, at tað kundi bera til at basa HB, og í seinna hálvleiki løgdu teir hart fyri. Roytn varð at trýsta HB aftur eftir hæli, og longu eftir góðum fimm minuttum stóð á jøvnum. Birgir og Palli býttu nú um leiklut. Palli slapp sær avstað í vinstra borði, og tá hann sendi innfyri, stóð Birgir við handara stólpa og stútaði bóltin inn.

Ivaleyst vóru tað nú vágbingarnir, sum høvdu sálarliga fyrimunin, men hóast hetta, so varð ferðin nú sett nakað niður. Kanska eisini tí VB hevði nýtt nógva orku til at koma innaftur í dystin, og tískil ikki vildu satsa alt ov nógv í royndunum at toga øll stigini til sín. HB hinvegin tóktist heldur ikki at vilja flyta alt ov nógv fólk niðan eftir vøllinum, og meira enn í fyrra hálvleiki gjørdist talan nú um eitt talv, har báðir partar ansaðu eftir ikki at selja seg og nógv.

Hetta merkti tó á ongan hátt, at nakar av poørtunum tók sær av løttum. Intensiteturin í nærdystunum á miðvøllinum var framhaldandi stórur, men so hvørt sum minuttirnir gingu, líktist tað alt meira einum javnleiki. Einum javnleiki, sum altso ikki fekk vent hagtølunum hjá HB í nakran serliga mun, og sum hinvegin heldur ikki gav heimaliðnum tey trý stigini, sum teir so harðliga høvdu brúk fyri.

Men Andrew vildi tað øðrvísi. Bert tríggir minuttir vóru eftir at leika, tá hann aftur var rætti maðurin á rætta staðnum. Aftur hesa ferð kom uppleggið frá Tór-Ingar, sum streyk avstað í vinstru. Innleggið fann vegin fram til innskifta Rók F. Jespersen. Bjarni Johansen hálvbjargaði fyrstu royndini, men bólturin støkk útaftur til Andrew, sum kundi leggja bóltin í tóma málið, og so var sigurin hjá HB veruleiki.

### Týdningurin

Og kanska meira enn nakað annað, so var sigurin samstundis ein ábending til hini níggju liðini um, at HB so avgjørt ikki hevur ætlanir um at geva meistaraheitið frá sær við góðum.

Nú triðingurin av landskappingini er farin aftur um bak, hevur HB trý stig niður til næstu kappingarneytarnar, og tá skal havast í huga, at henda leiðsla er skapt undir øllum øðrum enn góðum fortreytum. Við trimum av meira ella minni føstu leikarunum á langtíðar-skaðalistanum hevur Frank Skytte verið noyddur at umskipað liðið í mun til ætlaðu ideal-uppstillingina, men hóast hetta, so eru stigini framhaldandi komin inn á kontina, og nú neyðuga hepnið eisini tykist fylgja liðnum, kann væl verða, at HB fer at vísa seg sum sera tungur biti hjá hinum liðunum.

Hjá VB er eitt sindur øðrvísi statt. Ónda ringrásin hjá liðnum tykist nú veruliga hava fingið fastatøkur, og seinastu dystirnir hava víst seg sum slíkir, sum eru typiskir fyri lið í tunga endanum. Har er tað ofta ómetaliga tungt at venda gongdini, og nú øll hini liðini tykjast taka stig, gerst mótburðurin alsamt tyngri at vinna á. Tað er eisini væl hugsandi, at komandi dysturin verður ein sannur lagnudystur hjá VB. Tá kemur Skála á vitjan á Eiðinum, og hetta kann lættliga gerast dysturin, sum antin sendir VB upp frá botninum, ella sum so ruddiliga staðfestur, at árið í ár á ongan hátt skal verða teirra.

### Dysturin í tølum

**VB-HB 2-3 (1-2)**
0-1: Andrew av Fløtum, 9
0-2: Andrew av Fløtum, 25
1-2: Pali Augustinussen, 34
2-2: Birgir Jørgensen, 51
2-3: Andrew av Fløtum, 87
**Dómari :** Suni Johansen
**VB:** Bjarni Johansen – Dejan Nicolic, Eyðun Jacobsen, Michael í Lágabø – Mortan í Hørg, Slobodan Madzar, Dan Djurhuus, Milan Kulic, Palli Augustinussen – Birgir Jørgensen, Predrag Zivkovic
**HB:** Bárður Johannesen – Hallur Danielsen, Eli Thorsteinsson, Símun Eliasen, Janus M. Joensen – Rúni Nolsøe, Martin Christensen, Rógvi Jacobsen, Tór-Ingar Akselsen – Karsten From, Andrew av Fløtum

# Sigurin hevði alt at siga

**Hóast trý mál, so tóktist Andrew av Fløtum lítillátin eftir sigurin á VB**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*

Tað var ein fegin Andrew av Fløtum, sum vit fingu orðið á umborð á Smyrli eftir sigurin hjá HB í Vági sunnudagin.

Gleðin var kanska sjálvsøgd, nú ársins leikari frá í fjør hevði skotið hat-trick, men fram um hetta, so tóktist tað vera sigurin hjá liðnum, sum Andrew frøddist um.

- Hatta var ein ótrúliga týdningarmikil sigur. Vit hava jú ikki vunnið í Vági í 13 ár, so tað sigur seg sjálvt, at gleðin er stór, helt hann fyri.

Sjálvur hevur Andrew kanska ikki heilt funnið formin frá árinum í fjør, har hann eisini var toppskjútti, men málini sunnudagin lyftu hann ovast á máltindunum, nú triðingurin av kappingini er farin. Spurdur, um hetta kanska var tekin um, at hann nú er um at finna stórspælið aftur, tóktist álopsmaðurin tó ikki so ivaleysur, sum man skuldi trúð.

- Eg veit ikki um tú kanst siga, at eg fekk gongd á. Eg var tríggjar ferðir á rætta staðnum, men fyrst og fremst vóru hatta nøkur ótrúliga týdningarmikil mál. Sigurin hevði alt at siga fyri okkum, og tað er fyrst og fremst, sum hevur týdning fyri mítt viðkomandi, segði ein fegin trýmála skjútti altso eftir dystin.



*Hóast trý mál, so vildi Andrew av Fløtum helst tosa um sigurin, heldur um egna avrikið sunnudagin*